


# Fulltrúi til Skráseting Føroya & Tryggingareftirlitið

Søkt verður eftir fulltrúa til Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið.

Skráseting Føroya og Tryggingareftirlitið eru fyrisitingarliga skipað saman við Posteftirlitinum, Elveitingareftirlitinum, Kappingareftirlitinum og Fjarskiftiseftir litinum.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um gjøgnumgongd av roknskapum og at hava eftirlit sambært ársroknskaparlógini, tryggingarlógini, lógini um hvítvask, grannskoðaralógini og vinnufelagslógunum annars.

Starvið fevnir somuleiðis um málsviðgerð og leiðbeining av viðskiftafólki okkara í spurningum við tilknýti til nevndu lóggávu og at samskifta við okkara samstarvspartar í øðrum londum.

Arbeiðið krevur gott fakligt innlit serliga á roknskaparøkinum. Dentur verður lagdur á at tað arbeiðið, ið verður latið úr hondum er á høgum fakligum støði.

Førleikakrøv eru viðkomandi búskaparfrøðilig kandidatútbugving, t.d. cand. merc. aud., cand. oecon., ella cand. polit.

Royndir innan grannskoðan ella roknskap er ein fyrimunur.

Til rætta fólkið bjóða vit spennandi starv í góðum arbeiðsumhvørvi. Góðir møguleikar eru fyri eftirútbúgving.

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsóknir skulu sendast til Skráseting Føroya, Sigmundargøta 13, postboks 264, 110 Tórshavn, og vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 5. juli 2010 kl. 12.

Meira um starvið fæst at vita frá Kristin Balle, deildarleiðara, á tel. 356010, t-post krb@skraseting.fo ella frá Katrinu Mariu Johannesen, ráðgeva, á tel. 356027, t-post kmj@tryggingareftirlitid.fo

Skráseting Føroya
Company Registration Authority

Tryggingareftirlitið

Sosialurin FØROYABANKI

**Í Miðlahúsinum hóskvøldið 17. juni 2010 kl. 19.30**

# Fyrilestur í Miðlahúsinum
## um nýggju verjumálslógina

Tann 1 mai 2010 kom nýggj lóg um verjumál í gildi í Føroyum. Endamálið við nýggju lógini er fyrst og fremst at fáa eina broyting í reglunum viðv. ómynduggerð av vaksnum fólki.

Fyri at kunna nærri um hesa lógina, hevur Ríkisumboðið fyrilestur í Miðlahúsinum um nýggju lógina.

Fyrilestrahaldarar verða Lene Moyell Johansen frá Ríkisumboðnum og Arne Madsen frá Danmarks Statsforvaltning.

**Øll eru vælkomin.**




– trygt og ómakaleyst til hús www.inni.fo



# Móttøka

Í sambandi við at **Hannelena Mittún** er farin frá sum stjóri í P/F INNI og **Kára á Dunga** hevur tikið við stjórastarvinum bjóða vit til almenna móttøku í hølunum hjá P/F INNI
**fríggjadagin 18. juni 2010 frá kl. 15.00-17.00**

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

INNI

PF inni · Niels Finsensgøta 37 · Postboks 364 · FO-110 Tórshavn · Telefon 35 42 00 · inni@inni.fo